**Stovnar fyri hvørjar gjaldstovan førir lánibókhald**

| | | |
|---|---|---|
| **Roknskaparleiðbeining** | Dgf. 7. juni 2002 | Ár-nr.-slag **2002-5.0-A** |
| Til: Stovnar fyri hvørjar gjaldstovan førir lánibókhald | | |
| Heiti: Arbeiðsbýtið millum stovn og gjaldstovuna í sambandi við umsiting av lánum o.t. | | |

**Endamál:**
Gjaldstovan umsitur lánibókhaldið fyri nakrar stovnar. Endamálið við hesi leiðbeining er at greina hvørja ábyrgd gjaldstovan hevur í sambandi við hesa uppgávu. Stovnurin skal í roknskaparreglugerðini vísa til hesa leiðbeining.

**Ábyrgdarbýti**
Talan kann vera um tríggjar partar, sum eru inni í myndini, tá ið lán verða umsitin í Búskaparskipan landsins.

1. Stovnin, sum eigur skipanina
2. Gjaldstovuna, sum skrásetur fyri stovnin
3. Toll- og skattstovuna, sum krevur inn lán

**Uppgávur sum gjaldstovan tekur sær av eru:**

- at útgjalda lán við støði í útgjaldsboðum. Grundarlagið undir útgjaldsboðunum er øll viðkomandi skjøl.
- at upprætta lán o.t.
- at taka móti inngjaldingum
- renturokna
- niðurskriva studningslán
- útskriva og senda út terminsrokningar
- goyma lánsskjøl
- avskriva, tá ið krøv hava mist rættargildi. Kunning um hetta verður send viðkomandi ráði
- avseta móti tapi. Ráðið verður kunnað um hetta
- at mæla stovninum til formliga at senda krøv víðari til toll- og skattstovuna til innkrevjing
- senda víðari ymsar fyrispurningar til viðkomandi ráð til viðgerðar
- mánaðarliga senda út saldulista til viðkomandi stovn
- at umsita og "eiga" lániskipanina

Skráseting av veðhøldum fer fram í Landsbankanum. Veðhaldsupplýsingar til roknskapin hava støði í uppseting frá Landsbankanum.

**Samanumtøka:**
Sagt stutt, stovnurin tekur sær av allari skjalahandteringini, íroknað umsiting av trygdum og málsviðgerð í hesum sambandi, meðan gjaldstovan tekur sær av skrásetingarpartinum og toll- og skattstovan tekur sær av innkrevjingini.

Føroya gjaldstova, 7. juni 2002

Leif Abrahamsen